# Átta tilboð upp á djúphavnina í Vági



*Tað var stórur spenningur, tá ið tilboðini upp á djúphavnina í Vági vórðu latin upp á býráðsskrivstovuni í Vági mánadagin. Her sita Kristian Rasmussen frá Landsverkfrøðinginum, vinstrumegin, Hanus Hansen frá Landsbyggifelagnum, í miðjuni, og Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, og kanna tilboðini nærri, beint eftir, at tey vórðu latin upp*

**Byggitek hevði lægsta tilboðið, men onkur fyrivarni eru. Nú skulu tilboðini samanberast og so verður endalig støða tikin**

DJÚPHAVN
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Tilsamans átta tilboð komu inn uppá arbeiðið at gera djúpahavnina í Vági.

Tað varð greitt, tá ið tilboðini vórðu latin upp á býráðsskrivstovuni í Vági klokkan 13.30 mánadagin.

Tað er eisini greitt, at tilboðini samsvara rættiliga væl við tað, sum tað frammanundan varð mett, at djúphavnin fór at kosta, tí tann metingin segði, at hon fer at kosta 19,20 milliónir, umframt byggieftirlit og projektering, ella tilsamans einar 24 milliónir.

Men tað var ávísur munur á teimum ymsu tilboðunum og tað vóru 5,1 milliónir á muni á tí lægsta tilboðnum uppá 18,2 milliónir, sum Byggitek hevði og tí hægsta tilboðnum, sum var frá J&K. Petersen og sum var uppá 23,3 milliónir.

Landsbyggifelagið, sum stendur fyri útbjóðingini, fer nú at samanbera tey øll tilboðini og at gera tey ymsu fyrivarnini upp í pengum.

Tá ið tað er gjørt, verður funnið fram til, hvør hevur lægsta tilboðið, tá ið tikið verður samanum og so verða samráðingar tiknar upp við tað byggifelagið um at gera arbeiðið.

Ætlanin er at gera sáttmála um djúphavnina fyri summarfrítíðina, so at arbeiðið kann byrjað beinanvegin.

Djúphavnin skal vera liðug 30. september næsta ár og grótið verður tikið úr Dalinum í Lopra, har tað, sum kom úr Sumbiarbergholinum, liggur á goymslu.

### Tíggju metrar djúp

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur at tað, sum skal gerast, er ein stór útfylling út á fjørðin, har sum havnin er.

Síðani skal gerast ein atløgubryggja eystur og vestur uppá 86 metrar og sum verður 10 metrar djúp. Eisini verður ein atløgubryggja upp á yvir 70 metrar gjørd út og inn, har dýpið er ímillum 10 og sjey metrar

Í krókinum á eystursíðuni verður gjørd ur ein altjóða ferjuskrái og í krókinum vestureftir verður gjørdur ein minni ferjuskrái.

Sostatt ber til hjá tveimum skipum við ferjuskráa at liggja við bryggju í senn. Tað merkir eisini, at tað ber til at koyra av øðrum skipinum, beint umborð á hitt, so lasting og lossing skuldi gingið ógvuliga skjótt.

Og so skal tað eisini nevnast, at verður samferðsluhavnin í Trongisvági ikki liðug, tá ið nýggi Smyril kemur, fer ikki at standa á hjá honum at liggja í Vági.

Borgarstjórin í Vági sigur, at hetta er ein neyðug útbygging, tí tey stóru skipini, sum nú eru, fáa ikki brúkt havnina.

Og hann sigur, at hóast tað í løtuni sær eitt sindur svart út við vinnulívinum í Vági, fer gongd at koma á aftur einaferð, og tá ræður um, at umstøðurnar eru í lagi, sigur hann.

### Tilboðini í stuttum

Seks byggifeløg góvu tilsamans átta tilboð upp á at gera djúphavnina í Vági.

Tilboðini eru hesi.

| | |
|---|---|
| Byggitek | 18.209.280,00 krónur |
| C.N Bygg | 18.982.453,00 krónur |
| Articon | 19.784.338,96 krónur |
| M.T. Højgaard | 20.975.745,00 krónur |
| Pihl Føroyar | 3.300.000,00 krónur |
| J&K. Petersen | 23.302.695,91 krónur |

Umframt hesi høvuðstilboðini, høvdu J.K. Petersen eisini eitt annað tilboð, har teir bjóðaðu sær til at gera arbeiðið fyri 19.602.484,54 krónur, varð tekningin broytt.

MT. Højgaard bjóðaðu sær eisini at sláa 150.000 krónur av prísinum, vórðu onkrar broytingar gjørdar.

MVG er ikki við í tilboðunum.

Annars høvdu øll feløgini, uttan CN Bygg, ymisk fyrivarni, sum leggjast skal upp fyri, áðrenn endalig støða verður tikin til tilboðini

# Mest framkomna ellis- og røktarheimið

**Mánadagin vóru hakin og spakin settir í seinastu útbyggingina av Eysturoyar Røktar og Ellisheimi, sum flestu kommunur í Eysturoynni, saman við Føroya Landstýri fíggja**

ELLISHEIM
*Simun Joannesarson Hansen*



Talan er um eina rættiliga umfatandi útbygging, sum ger, at Eysturoyar Røktar og Ellisheim verður tað mest framkomna á sínum slag her á klettunum. Pláss verður fyri 24 búfólkum afturat, og bæði fysioterapiin og ergoterapiin fáa betri umstøður. Eisini verður sett á stovn ein mattænasta, soleiðis at matur verður koyrdur út til tey, sum hava tørv á tí í Eysturoynni. Møguleiki verður eisini fyri dagtilhald, har pláss verður fyri uml. 30 til 40 fólkum.

Samanumtikið so verður tað nógv betur møguleiki fyri røktarheimsfyribyrgjandi tiltøkum, tvs. at fólk kunnu fáa uppvenjingar í fysioterapiini og kunnu koma í ergoterapiina og møguleiki verður fyri bráðfeingis innleggjan, náttttilhald og umlætting, alt hettar til gagns fyri alla Eysturoynna.

Tað vóru landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, og stýrisformaðurin á Eysturoyar Røktar og Ellisheimi, Sæunn Ólavsdóttir Hansen, sum settu ávíkavist gamla hakan og nýggja spakan í.

Nú verður so farið undir at grava, og væntandi stendur nýggi tilbygningurin á Eysturoyar Røktar og ellisheimi klárur um ársskifti 2004-5.



# Harðan dóm fyri hópneyðtøku



*Menninir, sum her koma úr Landsrættinum, vóru skakaðir um dómin, sum teir fingu. Fýra teirra hava kortini roynt tað fyrr, tí bara ein teirra hevði rein revsipappír. Til klokkan 20.50 mánakvøldið.*

*Mynd: Nordfoto*

**Ein føroysk kvinna fekk uppreisn í Eystara landsrætti mánakvøldið. Teir seks dómararnir ógildaðu frídømingina í býrættinum í Keypmannahavn og dømdi í staðin einmælt fimm mans tvey ára fongsulsrevsing fyri hópneyðtøku tann 8. desember 2001. Teir skulu eisini rinda kvinnuni 50.000 krónur í skammbót**

LANDSRÆTTUR
*Ingi Rasmussen*

»Thi kendes for ret: De tiltalte, Brian Krosby Christensen, Martin Laurberg Hansen, Kim Marlow, Michael Christian Mosegaard og Michael Frank Koch Ritter, straffes hver med fængsel i 2 år.«

Dómararnir í Eystara landsrætti vóru eirindaleysur og feldu ein óvanliga harðan dóm mánakvøldið. Teir fimm menninir fingu tvey ára fongulsrevsing hvør fyri í felag at hava neyðtikið eina 25 ára gamla føroyska kvinnu tann 8. desember 2001.

Brádliga vóru leiklutirnir umbýttir. Menninir, sum eftir frídømingina í býrættinum, fóru sigursælir heim, sótu sum runnir í stein á einari trappu uttan fyri rættarsalin. Føroyska kvinnan, sum menninir gjøgnum alt rættarmálið hava háðað og spottað, kundi fara heim. Endiliga reinsað.

### Dømdir áður

Í býrættinum var dómurin tepur. Tann eini dómarin trúði kvinnuni, sum beinanvegin meldaði tilburðin. Hinir báðir trúðu monnunum, sum søgdu, at hon sjálv var við uppá tað.

Í Eystara landsrætti vóru dómararnir púra samdir. Teir tríggir landsrættardómararnir A.F. Wegner, Engler og Lone Andersen umframt tríggir dómsmenn stóðu einmælt aftan fyri dómin, sum Sosialurin hevur fingið útskrift av.

Burtur úr dóminum kann lesast, at tað ikki vóru Guds bestu børn, sum hava sitið á ákærubeinkinum. Teir flestu eru áður dømdir fyri ymisk lógarbrot. 29 ára gamli Martin hevur fingið narkodóm og hevur hótt eina kvinnu við eini pistól ímóti pannuni. 31 ára gamli Kim eru áður revsaður fyri rán. 28 ára gamli Michael Frank Koch Ritter er áður dømdur fongsul í átta mánaðir fyri rán. Og at enda er 24 ára gamli Michael Christian Mosegaard nýliga dømdur fyri eina aðra hópneyðtøku í Silkeborg.

Hóast tað ikki eigur at ávirka, so hevur tað ikki talað teimum til fyrimunar. Tað hevur heldur ikki talað teirra sak, at teir fyrr á kvøldinum leitaðu eftir eini skøkju at leggja kropp til fleiri mans samstundis. Men hugvekjandi var tað helst, at eingin skøkja vildi vera við til tað, sum teir pástóðu, at ofrið sjálv legði upp til.

### Sannførandi vitni

Undir øllum rættarmálinum, bæði í býrættinum og í landsrættinum, sýndu menninir lítla virðing fyri kvinnuni. Ákærin Kim Christensen helt, at teir royndu at gera hana til eitt sex-dýr, sum ikki fekk nóg mikið.

Hesum trúðu landsrættardómararnir ikki. Í dóminum verður sagt, at hóast frágreiðingin hjá føroysku kvinnuni stundum var ótrygg, var tað eftir próvførsluna eingin orsøk at ivast í, at hon segði satt. Hennara frágreiðing var eftirførandi og sannførandi, stendur í dómsúrskurðinum.

Frágreiðingin verður stuðlað av teimum skaðum, sum eru staðfestir á kvinnuni. Nevniliga merkir á undirarmi og knøum og skeinur í undirlívinum. Skaðar sum ein serlækni einans segði seg hava sæð eftir neyðtøku.

Frágreiðingin varð eisini stuðlað av, at kvinnan varð ógvuliga skakað, tá hon beint eftir hendingina meldaði tilburðin til løgregluna.

### Boðin inn - tvingað út

Sambært dómsúrskurðinum varð kvinnan boðin inn í jólafrokostin, tá hon var á veg heim eftir eitt annað borðhald í býnum. Føroyska kvinnan tók av og fór við í veistluhølini, har tað fyrr um kvøldið vóru hildin tvey strip-show. Hon var ávirkað men ikki full. Menninir høvdu drukkið fyri minst túsund krónur hvør, og onkur hevði sniffað kokain.

Hon var einasta kvinnan í hølinum, burtursæð frá barrvørinum, og sambært vitnum var hon bert til staðar stutta tíð. Landsrætturin heldur tað vera prógvað, at hon varð førd burtur ímóti sínum vilja og neyðtikin á einum borði í bakgarðinum. Tað var myrkt og kalt, um frostmarkið, og eingin møguleiki var at rópa á hjálp.

Dómararnir siga tað vera prógvað, at kvinnan ikki sjálvboðin luttók. Hon var »panisk angst«, sum tikið verður til, og var bara við, tí hon varð hótt. Landsrætturin metir málið og umstøðurnar sum serliga grovar, og tí eru menninir eisini dømdir at gjalda kvinnuni 50.000 krónur í skammbót. Teir skulu eisini rinda sakarmálskostnað til báðar rættirnar.

Málið er av. Dómurin er endaligur. Nærmasta framtíðin hjá monnunum er í fongslinum. Nú er eftir hjá føroysku kvinnuni at leggja málið aftur um seg og koma víðari við lívinum.

### Málið

Ein jólafrokostur tann 8. desember 2001 endaði við, at fimm ella fleiri menn tvingaðu eina tá 25 ára gamla føroyska kvinnu til samlegu og annað í einum bakgarði á Nørrebro.

Í januar fríkendi býrætturin í Keypmannahavn menninir, men málið varð kært.

Mánadagin dømdi Eystari landsrættur einmælt menninir, sum hava sagt seg vera ósekar, men viðgingu at hava verið saman við kvinnuni.